

# Føroyar mítt land

Vikan í sendirøðini "Føroyar mítt land" á Rás2 byrjaði við einari sending um 200 ára gamla Fuglakvæði Nólsoyar-Páls; mikudagin hoyrdu vit 10. sending um føroyska tjóðbúnan – hesa ferð um mannfólkabúnan, buksurnar og stúkuna; og annars vóru vit, kunnu vit siga, bæði til fjals og til fjøru, ella heldur til fjøru og til fjals, tí vit hoyrdu um fiskiárið 1935 hjá sluppini Reykjanesi; um útróður – mið, plinkar og ýti, og um eina gonguferð gjøgnum ta brøttu Stefansgjógv í fjallinum Núgvuni oman fyri Norðadal. Turið Sigurðardóttir, Andreas Andreasen, Nicolina Jensen Beder, Janus Mohr og Hanus Kamban løgdu sendingarnar til rættis hesa vikuna.

Rás2, sunnudagin klokkan 13.

## Føroyar mítt land í næstu viku:

9/6 Kári Mikkelsen
10/6 Eirikur Lindenskov
11/6 Nicolina Jensen Beder
12/6 Janus Mohr
13/6 Freydis Poulsen

Hvønn gerandisdag kl. 8, kl. 9, kl. 22 og kl. 23, (týsdag tó 22.30)




**Endurlýsing**

*Kunningarstovan í Runavík er ein deild undir Runavíkar kommunu. Á Kunningarstovuni vitja umleið 7.000 fólk um árið, bæði føroyingar og útlendingar. Tvær kunningarstovur eru í Eysturoynni, ein í Fuglafirði og ein í Runavík. Báðar kunningarstovurnar eru partur av Ferðavinnuni í Eysturoynni, sum er eitt økisferðavinnufelag hjá ferðavinnuni, kommununum og ferðavinnuveitarum í Eysturoynni og Norðurstreymoy.*

*Kunningarleiðarin seinastu 7 árini hevur valt at søkja nýggjar avbjóðingar, og verður tí søkt eftir*

## Leiðara
### til Kunningarstovuna í Runavík

Arbeiðið sum leiðari á Kunningarstovuni í Runavík er eitt spennandi, fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiði við nógvum avbjóðingum, har tú, umframt dagligu leiðsluna, skalt menna og samskipa tiltøk innan ferðavinnu og mentan.

Kunningarstovan húsast í umsitingarbygninginum hjá Runavíkar kommunu og hava bæði felags móttøku. Sum partur av Runavíkar kommunu, er Kunningarstovan við til at mynda Kommununa og skapa eitt andlit úteftir. Kunningarstovan er soleiðis vorðin ein týðandi tænastudepil fyri ferðavinnuna og mentanina í Kommununi og økinum sum heild.

Arbeiðsuppgávurnar, sum tú kemur at røkja:

**Høvuðsuppgávur**
* Ábyrgd av dagligu leiðsluni av kunningarstovuni
* Samskipan av tiltøkum í Runavíkar kommunu
* Marknaðarføring
* Røkja heimasíðuna hjá Runavíkar kommunu og Ferðavinnuni í Eysturoynni
* Veita vitjandi eina góða ráðgeving og tænastu
* Samstarva við ferðavinnuveitarar í økinum, Samvit og hinar kunningarstovunar í landinum
* Umsita Eysturoyar gongufelag
* Umsita Økisferðavinnufelagið og vera skrivari á nevndarfundum

**Førleikar:**
* Viðkomandi útbúgving ella royndir innan sølu, marknaðarføring og ferðavinnu
* Leiðsluførleikar og góð samstarvsevni
* Duga væl at orða seg, bæði munnligt og skrivligt á føroyskum, norðurlendskum og enskum
* Góðan telduførleika

**Persónligir eginleikar:**
Sum persónur vænta vit, at tú ert skapandi, ágrýtin og miðvísur, tær dámar væl stórar avbjóðingar, og tú hevur lætt við at samskifta og samstarva. Tú hevur eitt lætt lyndi og ert fleksibul. Tú trívist við at arbeiða ímóti freistum og hevur evnir til at hava ein jaligan hugburð bæði innan- og uttanhýsis. Tú kemur at starvast saman við umsitingini hjá Runavíkar kommunu, men hevur ábyrgd av egnum øki, tí er neyðugt, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ikki ert bangin fyri avbjóðingum og at umboða økið.

**Umsóknin:**
Umsóknir verða at senda skjótast gjørligt og skulu vera Runavíkar kommunu í hendi í seinasta lagi týsdagin 17. juni. Umsóknirnar skulu stílast til: Runavíkar kommuna, Heiðavegur 26, 600 Saltangará. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rannvá Troest á tel. 666600 ella 566603 Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

# Skráin fyri Rás 2

## Fríggjadagur 6. juni

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land – Hanus Kamban leggur til rættis
08:05 Bilradio (e)
09:00 Føroyar mítt land – Hanus Kamban leggur til rættis
09:05 Norðoyasending – Sent verður beinleiðis úr Klaksvík
10:00 Lýsingar
11:00 Tíðindi
11:05 Norðoyasendin – Sent verður beinleiðis úr Klaksvík
11:30 Lýsingar
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Norðoyastevnusending – Sent verður beinleiðis úr Klaksvík
15:00 Tíðindi
15:05 Norðoyastevnusending – Sent verður beinleiðis úr Klaksvík
16:00 Tíðindi
16:05 Norðyastevnusending – Sent verður beinleiðis úr Klaksvík
17:00 Tíðindi
17:15 Mentanarnátt í Havn
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
19:00 Norðyastevnubitar (e) – Sent verður beinleiðis úr Klaksvík
21:00 Tónleikasending hjá Heimamissiónini – Ásbjørn Berthelsen velur tónleikin.
22:00 Føroyar mítt land – Hanus Kamban leggur til rættis
22:05 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land – Hanus Kamban leggur til rættis
23:05 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Leygardagur 7. juni

07:00 Tónleikur
10:00 Vespureiðrið (e)
11:00 Tónleikur
12:00 Tónleikur
13:00 Bilradio (e) – Maggi Gunnarsson er vertur
14:00 Tónleikur
21:00 Halleluja – Heine Lützen og Andrew Djurhuus leggja til rættis
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Sunnudagur 8. juni

07:00 Gospel tónleikur
13:00 Nú skínur sól – Sangur og tónleikur til Hvítusunnudag. Janus Mohr leggur til rættis.
14:00 HittTónleikur
17:00 3. hálvleikur – Heri Simonsen leggur til rættis
18:30 Tónleikur
21:00 Kelduvaðið – Sending hjá EVR
22:00 Tónleikur
23:00 Liðugt

## Bilradio

Bilradio verður sent týsdag millum kl. 16 og 17 og endursent fríggjamorgun millum kl. 8 og 9 og leygardag kl. 13.

RÁS
...títt radio